## Sarkozy harmast Rwanda



Franski forsetin, Nicolas Sarkozy, viðurkennir nú, at Frakland og onnur lond í altjóða samfelagnum gjørdu mistøk í sambandi við fólkadrápið í Rwanda í 1994. Á einum tíðindafundi í rwandiska høvuðsstaðnum Kigali í gjár segði Sarkozy, at altjóða samfelagið noyðist at taka sorgarleikin í Rwanda til eftirtektar og at fyribyrgja, at slíkt skal henda aftur. Rwandiska stjórnin kvetti sambandið við Frakland í 2006, tí hon vildi vera við, at hópsdrápsmenninir í 1994 høvdu fingið venjing frá franska herinum.

## Gaddafi hóttir Sveis

Libyski leiðarin, Muammar Gaddafi, vil hava allar rætthugsandi muslimar at fara í heilagt kríggj ímóti Sveis, tí landið vil ikki hava muslimsk biðitorn. Ta avgerðina tók sveisiska fólkið á einari fólkaatkvøðu í fjør. Muammar Gaddafi sigur, at teir muslimar, sum hava nakað samband við Sveis, eru vantrúgvandi og ímóti islam og Muhammed profeti. Libyski leiðarin hevur fyrr sagt, at sveisiska forboðið ímóti muslimskum biðitornum eigur at fáa ST at flyta sínar skrivstovur úr Sveis.

# Panodil-regla skal fække um sjálvmorð

**Danska stjórnin skjýtur upp, at ung undir 18 ár skulu ikki kunna keypa pínustillandi heilivág í handkeypi. - Hetta er eitt stig rætta vegin, sigur andstøðan**

HEILIVÁGUR

*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*



*Tað skal verða verri fyri at fáa pínustillandi heilivág til ung*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Danmark:** Tað skal gerast ólógligt hjá ungum undir 18 ár at keypa henda heilivágin. Hetta stendur í arbeiðsætlanini hjá nýggju donsku stjórnini.

- Politiska viðgerðin av nýtsluni hjá teimum ungu av hesum heilivágínum riggar als ikki.

- Men við hesum átakinum vilja vit greitt vísa, at vit virkin vilja royna at minka um nýtsluna millum tey ungu, sigur formaðurin í donsku heilsunevndini, Preben Rubiengaard úr Vinstra-flokkinum við Ritzau.

Seinastu tølini frá Heilsustýrinum vísa, at sjálvmorðsroyndirnar millum ung við pínustillandi handkeypsheilivági settu met í 2009.

Í november mánaði í fjør vóru 345 sjálvmorðsroyndir skrásettar. Metið frammanundan var frá 2007, tá 354 sjálvmorðsroyndir vóru skrásettar alt árið.

### Best við resept

Hetta heldur keðiliga metið, hevur eisini vakt áhugan í danska javnaðarflokkinum.

Haðani verður sagt, at stjórnin her er á skeivari leið.

- Stjórnin átti heldur at fingið í lag, at ein fekk smærri pakkar við panodili í handkeypi. Aldursmarkið fer ikki hava stóra ávirkan á tey ungu, sum veruliga eru í kreppu.

- Tey fáa uttan iva fatur í tí á onkran annan hátt, sigur Sophie Hæstrup Andersen úr javnaðarflokkinum.

Hon heldur, at ein í framtíðini eigur at skipa soleiðis fyri, at ein skal hava resept fyri at keypa pínustillandi handkeypsheilivág, um pakkin fer upp um 100 tablettir.

Preben Rudiegaard skilir væl atfinningarnar frá javnaðarflokkinum. Hann er sinnaður at kanna málið, um ein ikki kann fáa smærri pakkar.

- Vit fara at hyggja positivt eftir hesum í heilsunevndini, sum aftur verður ein fylgja av einum lógaruppskot, sum fer at seta aldursmark á.

- Hetta skal síggjast sum ein samlað eind, sigur Preben Rudiengaard.

FAKTA

**Sjálvmorðsroyndir millum gentur 12-20 ár**

Talið av sjálvmorðsroyndum hjá gentum í aldrinum 12 til 20 ár við pínustillandi heilivági hækkaði sera nógv í 2005, vísa donsk tøl.
Eftir hetta fækkaði talið nakað, men er síðani farið at hækka aftur.
Her er eitt yvirlit yvir innleggingar á sjúkrahús, har sjálvmorðsroynd við heilivági, har acetylsalicylsýra (ella: magnyl) ella paracetamol (ella: panodil) var í:

2003: 242
2004: 235
2005: 292
2006: 245
2007: 318

*Kelda: Sundhedsstyrelsen (Landspatientregistret)*

# Á seturskúla saman við hinum

**Leguhúsið í Nesvík bjóðar nú øllum flokkum í framhaldsdeildini á seturskúla. Tiltakið verður í mai mánaði**

NÆMINGAR

*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*





*Leguhúsið í Nesvík verður karmur um serstakan seturskúla í mai mánaði*

**Nesvík:** – Ber til at fáa 150 næmingar úr ymiskum skúlum at hugna sær saman í tvær nætur í leguhúsinum?

Hetta er avbjóðingin, sum fólkini í leguhúsinum hava sett sær fyri at prógva.

Tey hava sett sær fyri at undirhalda hesum næmingum við alskyns tiltøkum, virksemi, vitjanum og sjálvandi eisini sosialari samveru.

– Uppleggið er, at næmingarnir skulu taka sær av løttum, meðan vit skipa fyri ymiskum tiltøkum, verður sagt úr leguhúsinum.

Av tí at pláss einans er fyri 150 næmingum ísenn, verður heitt á skúlarnar um at tekna seg skjótt.

### Dansur og bovling

Í komandi døgum verður eitt skriv sent út til allar framhaldsdeildirnar í landinum, við einum tilboði um ein øðrvísi seturskúla.

Leguhúsið í Nesvík verður karmur um henda seturskúlan, sum helst er tann fyrsti av sínum slagi í Føroyum.

Tað mest sermerkta við hesum seturskúlanum er, at tað ikki bert verður ein flokkur, ið verður í Leguhúsinum í senn. Seturskúlin er skipaður soleiðis, at upp til 150 næmingar kunnu hugna sær saman.

Ymisk ungdómstiltøk vera á skránni m.a. fótbóltskapping, svimjing, dyrging og hugnakvøld, har ið ein bólkur kemur at luttaka við umtóktum tónleiki.

Eitt annað heldur óvanligt tiltak á seturskúlanum er eitt dansiskeið, har tvey fólk, ið eru von við undirvísing í dansi, fara at læra næmingarnar hetta.

Ein vitjan verður haraftrat í Eysturkommunu, har møguleiki verður bæði at svimja, bovla og at fiska.

Kostnaðurin fyri allan seturskúlan er 525 krónur fyri hvønn næmingin.